LM-021/2025

Sólgerð Hjørleifsdóttir

FYLGISKJAL 3

Fra: Sólja í Ólavsstovu <solja@lararafelag.fo>
Sendt: 15. september 2025 10:02
Til: Almanna- og mentamálaráðið
Cc: Ann Ellingsgaard; Súni Selfoss; Óluva Í Gong; mary@hhff.fo; sanna@pedagogfelag.fo; Skrivstova Akf
Emne: Føroya Lærarafelag - hoyringssvar.lønarmiss
Vedhæftede filer: hoyringssvar.lønarmiss.pdf

Almanna- og mentamálaráðið
/her

Hjálagt hoyringssvar um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur

Sólja í Ólavsstovu
Løgfrøðingur
Fartlf. +298 23 57 69

LM-021/2025

Til
Almanna- og mentamálaráðið

15.09.2025

Hoyringssvar til uppskot til um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur

Føroya Lærarafelag tekur undir við uppskotinum at hækka endurgjaldið fyri inntøkumiss fyri at ansa barni í heiminum, men heldur tó, at tað vantar ein grundgeving fyri, hví ásett er, at mesta útgjald er kr. 31.000 kr. Mesta útgjald í uppskotinum er ásett, uttan at nakrar útrokningar ella grundgeving eru fyri hesi upphædd. Til samanberingar kann nevnast, at verandi upphædd úr barsilskipanini er 80 kr. hægri.

Tað vantar harumframt ein útrokning fyri, hvørjar avleiðingar uppskotið kann fáa á m.a. barnagarðsgjaldið, tí hetta gjald hækkar samstundis sum gjaldið fyri fyri mista arbeiðsinntøku hækkar.

Felagið heldur grundleggjandi, at upphæddin fyri inntøkumiss er ov lág og munar ikki hjá fíggjarliga sperdum barnafamiljum, serliga hjá einsamøllum uppihaldarum. Sum útgangsstøðið eigur eingin at vera fyri lønarmissi í mun til sína sáttmálaløn. Sum dømi kann nevnast, at sáttmálaásetta lønin hjá einum lærara á byrjanarstigi tann 1. oktober 2024 var kr. 32.163. um mánaðin, umframt 17 % í eftirløn.

Tað er í størsta mun ungir lærarar, sum koma í eina støðu, har tey hava tørv á at vera heima hjá barni, sum hevur eina varandi sjúku ella ikki megna at vera í teimum tilboðum, sum teimum standa í boði. Hetta er samstundis ein bólkur, sum hevur stórar útreiðslur til bústað, barnagarð og møgulig lestrarlán. Tað er tí nærum ógjørligt hjá hesum lærarum at fara niður í løn, fyri at verða heima hjá barni sínum. Hesi børn verða fyri vanbýti, tí foreldur teirra ikki hava tað fíggjarliga rásarúmið til at vera heima hjá teimum, hóast tørvur er á hesum.

Hámarkið til endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku varð sett í forsorgarlógina í 2009. Áðrenn hetta varð fult endurgjald veitt, uttan mun til støddina á lønarmissinum.

Føroya Lærafelag fer at mæla til, at skipanin við endurgjaldi fyri inntøkumiss verður broytt aftur til ta upprunaligu, soleiðis at foreldur fáa endurgoldið mista arbeiðsinntøku, sum tey sambært lønarsáttmála hava rætt til, fyri at ansa børnum sínum heima.

Vinaliga

Jacob E. Ols.

Jacob Eli S. Olsen, formaður
Føroya Lærarafelag